# Selamons ríma

1. Selamon læt sær klæði skera,
   ”Harra mín”
   tí hann skyldi sítt sbrúdleyp gera.
   ”Um summari, har allir fuglar syngja
   væl.”

2. Hann beyð upp á bríkir
   mangar menn og ríkar.

3. Hann beyð upp á beinkir
   ríkar menn og einkjur.

4. Hann beyð til so mangan mann
   kongsins son av Engelland

5. Selamon man tonkja
   frillan hon skal skeinkja.

6. Alt hon skonkti, alt hon bar,
   fyrstur Selamon svikin var.

7. Hann vá til tað fyrsta,
   fyri bar silvurkista.

8. Hann vá til tað annað,
   fyri bar silvurkanna.

9. “Hoyr tú brúðurin Anna,
   halt stýr á tínum manni“.

10. ”Eg honum ikki fái stilt,
    óndar konur hava hann vilt”.

11. ”Eg honum ikki stilla kann,
    stilli hann Gud tann heilig and.”

12. Hann vá upp á bríkar
    mangar menn og ríkar.

13. Hann vá upp á beinkir,
    mangar menn og einkjur.

14. Hann vá til so mangan mann,
    kongsins son av Engelland.

15. Hann vá til tað triðja,
    brúðrina av um miðju.

16. Tá íð hann hevði vunnið ta háð,
    tá lysti Selamon til songar at gá.

17. Tann fyrsta svøvn, í Selamon fár,
    frillan á hans armi lá.

18. Tann fyrsta svøvn, ið Selamon fekk,
    frillan av hans armi gekk.

19. ”Gakk tú teg í hallina frítt,
    at skoða aftanspælið títt.”

20. Selamon inn í hallina leit,
    hans unga brúður í blóði fleyt.

21. Selamon inn í hallina sá,
    hans unga brúður í blóði lá.

22. Selamon við sínum svørði brá,
    hann kleyv frilluna í lutir tvá.

23. Selamon gongur undir hallarvegg,
    talar við sína svørðsegg.

24. “Hoyr tú, brandur rjóði,
    kanst tú vekja bljóði?”

25. ”Ja, og menn, at eg tað kann,
    ert tú maður at veja fram?”

26. ”Ja, og menn, at eg tað vil,
    ert tú maður at vega til?”

27. Skaftið setir hann niður á stein,
oddin fyri sítt hjartabein.

28. Skaftið setir hann niður á grót,
oddin fyri sína hjartarót.